gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið sosialurin Telefon 311820 Telefax 314720 Internetadressa: www.sosialurin.fo e–mail: post@sosialurin.fo

Veðrið

Fimmdagaforsøgnin frá DMI

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Lot til andøvsgul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið hósdagin:
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av landsynningi og stundum regn. Hitin millum 10 og 13 stig.



Veðrið frígjadagin:
Hvassur vindur av landnyrðingi og stundum regn, men um kvøldið minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig .

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, men seinni lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 9 og 13 stig.

Hýrurin var góður á hvalbingum og sandvíkingum mánadagin. Tríggir døglingar høvdu leitað sær inn á fjørðin og tað eydnaðist at fáa tveir av teimum, men tann triði salpp

Døglingar løgdu beinini í Hvalba

ÁKI BERTHOLDSEN

Mánamorgunin løgdu tveir døglingar beinini í Hvalba.

Tað var, tá ið hvalbingar vóru farnir frá húsum mánamorgunin, at teir varnaðust at tríggir døglingar lógu heilt inni á fjørðinum.

Bátar vórðu skjótt mannaðir og tað eydnaðist at reka tveir av døglingunum inn á sandin, har teir vórðu hildnir til.

Har mátti elsti maður í drápinun, hin 83 ára gamli Olivur Holm, vanliga nevndur Olivur við Bakkhús, taka um endan, hann vaðaði út upp undir bringuna og skar báðar á háls.

Døglingar eru nokk so sjáldsamir og hann heldur, at tað er spurningurin, hvussu nógvir av teimum yngru duga at skera á háls.

Olivur við Bakkhús sigur, at tá ið døglingur skal skerast á háls, skal albógvin setast í blástrið og hondin strekkjast aftureftir. So skal skerast við fingrasnipparnar.

Er døglingurin stórur, verður skorið eitt sindur aftanfyri fingrasnipparnar og er hann minni, verður eitt sindur drigið frá.

Hesir báðir døglingarnir vóru ikki av teimum størstu. Teir vóru góðar seks metrar hvør. Einaferð ímeðan Busch var prestur, var ein døglingur dripin, sum var so stórur, at tá ið kúlan var skorin av, var tað akkurát so at Busch strekti hana – undir hatti

Miðal stødd

Teir báðir døglingarnir, sum vórðu dripnir, vóru ein hannhvalir og ein honhvalur. Tann, sum slapp, var tann minsti, helst var tað ungin.

Hetta vóru ikki av størsti døglingum, tann størri var 6,50 metrar og tann minni var 6,30 metrar.

Hetta er miðalstødd, siga hvalbingar, tí teir kunnu eisini vera minni enn hesir, men teir kunnu eisini vera nógv størri.

Olivur við Bakkhús sigur, at hann hevur hoyrt, at einaferð Busch var prestur, var ein døglingur dripin, sum var so stórur, at tá ið kúlan var skorin frá, var tað akkurát so, at Busch strekti hana – undir hatti.

Men hann minnist eisini, at døglingar hava verið so stórir, at teir hava verið noyddir til at seta hvalváknið á, fyri at fáa mønuna av, tí teir rukku ikki við knívinum.

Á hesum báðum døglingunum, sum vórðu dripnir mánadagin, vóru 2.457 kilo av tvøsti. Døglingar verða býttir til fólkið í sóknini, sum eru bygdirnar Hvalba og Sandvík.

Í hesum báðum bygdunum búgva 799 fólk og tey fingu sostatt trý kilo av tvøsti í part.

Gamalt er, at tann, sum finnur døglingarnar, eigur kúluna. Nú á døgum er kúlan ikki høgt í metum, men tað var hon fyrr, tí hon er full av lýsi, sum var dýrmett vøra fyrr og sum kundi seljast fyri góðan prís.

Lýsið varð eisini brúkt ímóti ymsum sjúkum, bæði hjá heidnum og kristnum.

Hevði onkur ilt í lendunum ella var ringur av krími, vóru hyggjuráðini at stoyta eitt sindur av døglingslýsi í eitt eina ullartógvu, ella eitt ullint plagg og leggja tað á.

Tað var somuleiðis vanligt at brúka lýsið at lekja ymisk sár við, bæði hjá fólki og hjá kríatúrum.

Um heystarnar var eisini vanligt at stoyta eina lítla súpiskeið av lýsi í sleppingarlombini fyri at verja tey ímóti bráðasótt.

Spikið er ikki etandi, men tað er sera feitt. Fyrr varð tað karvað sundur og lagt í íløt so at tað kundi renna og síðani varð tað smeltað. men nú verður spikið burturbeint.

Elsti maður í drápinum, hin 83 ára gamli Olivur við Bakkhús mátti taka um endan. Hann vaðaði upp undir bringuna og skar báðar á háls



Lágtrýstið yvir Norðhavinum hvørvur í landnyrðing og hátrýstið yvir Írlandi fer í landsynning.



Lágtrýstið vestanfyri Skotland fer í landnyrðing og dýpist og gevur hvassan vind hósdagin á okkara leiðum.



Hitalagið mált frá 28./08. kl 06⁰⁰–29./08. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,3°C
Minsti hiti máldur í august: **0,2°** Mesti hiti máldur í august: **22,0°**



Avfallið: <0,1 mm – **mált frá 28./08. kl 6⁰⁰–29./08. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í august: 83,0 mm

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	8
Nuuk	9
Qaqortoq	11
Ammassalik	6
Saint John's	–
Halifax	–
Reykjavík	11
Seyðisfjørður	12
Tórshavn	12
Lerwick	11
Aberdeen	13
London	17
Tromsø	13
Bergen	14
Oslo	–
Stokkhólm	–
Keypmannahavn	19
Helsinki	18
Moskva	19
Berlin	16
Warzawa	22
Kiev	20
Bukarest	24
Paris	19
Madrid	28
Róm	28
Malorca	30
Athen	28
Malta	37
Tunis	32
Beijing	28
New Dehli	32
Bangkok	31
Jakarta	–
Sydney	–
New York	22
Miami	27
Los Angeles	19
Meksikobýur	20
Panama	–
La Paz	13
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	13

Vestfalskyrrindi

27. aug.: Mánin næstur jørðini
29. aug.: Tendring
5. sept.: Fyrra kvarter

Kelda: Skipalistin 2000

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp	Suðuroyar-/Vágafirði sp	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp	Hestfirði/Sundalagnum fp	Hestfirði/Sundalagnum sp	Vestmannasundi fp	Vestmannasundi sp	Mykinesfirði fp	Mykinesfirði sp	Nólsoyarfirði fp	Nólsoyarfirði sp	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp	Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp	Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði sp	Hvannasundi fp	Hvannasundi sp	Fugloyarfirði fp	Fugloyarfirði sp
30. aug.	07.58	20.16	06.58	19.16	07.13	19.31	09.58	22.16	10.58	23.16	06.13	18.31	05.13	17.31	08.13	20.31	09.13	21.31	07.43	20.01	08.58	21.16
31. aug.	08.33	20.49	07.33	19.49	07.48	20.04	10.33	22.49	11.33	23.49	06.48	19.04	05.48	18.04	08.48	21.04	09.48	22.04	08.18	20.34	09.33	21.49
1. sept.	09.08	21.26	08.08	20.26	08.23	20.41	11.08	23.26	–	12.08	07.23	19.41	06.23	18.41	09.23	21.41	10.23	22.41	08.53	21.11	10.08	22.26
2. sept.	09.45	22.03	08.45	21.03	09.00	21.18	11.45	–	00.26	12.45	08.00	20.18	07.00	19.18	10.00	22.18	11.00	23.18	09.30	21.48	10.45	23.03